# Eg vildi aftur til Føroya

**Á veg til Hetlands svav Nils Torp eina nátt í Føroyum, og honum dámdi so væl, at hann beinanvegin visti, at hetta var eitt land, hann vildi vitja aftur. Nú 20 ár seinni eru hann og konan í Føroyum á konsertferð**



FO/DK KONSERTFERÐ

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Vit fingu orð á Nils Torp úr Souvenirs niðri á Café Nátúr. Hann var júst komin til Havnar, og hitti fyriskiparararnar Elin Hentze úr Norðurlandahúsinum og Kaj Johannesen formann í Føroya Undirhaldstónleikarafelag í hugnaligu kaféini. Hann helt fyrsta inntrykk av Føroyum vera sera gott. Men segði sum var, at hann júst var komin, so upplivingarnar vóru ein biltúrur til Havnar, kamari á hotellinum og so hendan ølin á Café Nátúr, og serliga ølin gjørdi stórt inntrykk. Hann helt Black Sheep hjá Føroya Bjór vera eina framúr góða øl: »Hon smakkar jú óvanliga væl« segði hann við kátari rødd.

### Vildi aftur til Føroyar

Annars helt hann túrin til Havnar vera sera flottan, hesi ráu fjøllini, góvu eitt sera sterkt inntrykk. »Tað er í sovorðnum umhvørvi, at vit fáa tann besta íblásturin. Summi halda, at tað er gott at fara suðureftir – at sita í Italia ella suður Fraklandi og skriva. Men tað besta fyri okkum er at fara norður eftir.« sigur Torp.

»Eg var í Føroyum við bólkinum Kliche fyri 20 árum síðan. Vit vóru á veg til Hetlands at skriva tekstir til eina fløgu. Vit fóru við skipi, so vit skuldu vera í Føroyum eitt døgn, áðrenn vit fóru víðari til Hetlands. Eg skilti beinanvegin, at hetta var eitt serligt stað, ið eg vildi aftur til«. Greiður hann frá.

Men 20 ár gingu, áðrenn Nils Torp slapp aftur til Føroyar.

Høvið gjørdist konsertferðirnar, sum Norðurlandahúsið, Føroya Undirhaldstónleikarafelg og donsku tónleikarafeløgini DJFBA og DAF skipa fyri. Sambært Nils valdu tey at søkja um at luttaka á konsertferðunum, tí tey elska at ferðast við sínum tónleiki: »Tað er sera gevandi at uppliva nýggj lond og nýggjar áskoðarar, serliga áskoðarar sum skilja danskt. Okkara tekstir eru týdningarmiklir, og tí er gott um áskoðararnir skilja teir. Vit spældu tildømis í Grønlandi fyri nøkrum árum síðan. Eg haldi vit mundu hava spælt í ein hálvan tíma, áðrenn vit fataðu, at teir flestu áskoðararnir ikki skiltu okkum.«

Ongin av hinum limunum í bólkinum hevur verið í Føroyum fyrr, so hetta er spennandi fyri tey øll, og Nils Torp sigur, at hann skilur, at hann bara skal vera lukkuligur yvir, at hann er lendur í øllum góðum og ikki situr í Bergen ella í Íslandi.

### Fleiri landaplágir

Nils spælir bass, ljómborð, gittar, violin, cello, harmonika, rødd og mangt annað í Souvenirs, ið umframt hann telur konu hansara Sofie Bonde, sum syngur og spælir gittar. Á konsertum hava tey eisini nakrar tónleikarar við sær. Souvenirs hevur havt sannar landaplágur í Danmark við løgunum »Jeg troede, du var hos Mikael«, »Danse i Måneskin« og »Jeg hader Susanne«.

Tey hava spælt á stórum og smáum spælistøðum kring Danmark síðan fyrst í 90'unum, og hava megnað ferð eftir ferð at endurtaka successina og fáa nýggj hittløg.

Á konsertunum í Føroyum spæla Souvenirs kendu løgini, men hava eisini valt nøkur ókend løg at spæla. Høvið verður at hoyra bólkin í eini fólkatónleikarakendari útgávu, við eitt sindur spinklari uppseting enn ofta fyrr. »Hetta klæðir væl til minnið spælistøð, sum tey har vit spæla í Føroyum.« sigur Nils og heldur fram: »Mær dámar nógv betur at spæla í smáum spælistøðum enn stórum. Tú fært nógv betur samband við áskoðaran og tað gevur ótrúliga nógv. Ofta velur man at spæla stór støð, tí meira peningur er í teimum konsertunum, men tað er óheppið, tí hitt er nógv stuttligari«.

### Kenna Ole Wick

Aftan á samrøðuna, skal Souvenirs til døgurða hjá Ole Wick. Niels og Sofie hava búð í sama býi í sum Ole Wick og kennast soleiðis. Tað er ivaleyst gjøgnum Ole Wick, at Nils kennir føroyskan tónleik. Hann kennur t.d. væl tónleikin hjá Kristian Blak, og hevur inntrykk av at føroyski jasspallurin er sera sterkur. Hann kennir harumframt fleiri danskar tónleikarar, sum hava spælt konsertir í føroyskum hellum. Men av tí meira poppkenda undirhaldstónleikinum, kennir hann bara Teitur, sum hevur verið spældur í donskum útvarpi. Hann er tí spentur at hoyra, hvat Páll Finnur Páll hava at bjóða honum sum lurtara.



**The Dreams fara í desember til London at spæla eina sýnisgluggakonsert fyri umboðum frá nógvum ymiskum plátufeløgum, m. a verður Sony Music umboðað**

# Dreymurin livir enn

TÓNLEIKUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Hóast The Dreams ikki sluppu at hita upp fyri Anastaciu, og ikki vunnu upptøku av einum lagi í frálíkum upptøkuhøli í London, tá teir luttóku í MTV a cut, so livur dreymurin um at gerast kendur yrkistónleikari enn, og nú sær tað út sum, tað kanska kann gerast til annað enn ein dreym.

The Dreams fara í desember til London at spæla eina sýnisglugga konsert fyri umboðum frá nógvum ymiskum plátufeløgum. M.a verður Sony Music umboðað. Nógv plátufeløg hava sýnt áhuga í bólkinum eftir luttøkuna í kappingini MTV a cut, har The Dreams gjørdist millum fýra teir síðstu bólkarnir.

Eisini fleiri av hinum luttakandi bólkunum tykjast áhugaverdir fyri plátufeløg, og tí hevur manningin aftan fyri MTV a cut gjørt av at skipa fyri eini sýnisglugga konsert, har allir MTV a cut bólkarnir luttaka. Umboð fyri nógv plátufeløg og tónleikaídnaðin annars koma at lurta. Hetta er ein fantastiskur møguleiki hjá okkum, sigur umboðsmaðurin hjá The Dreams Sverre Nolsøe. The Dreams ætla sær at taka henda møguleika, og fara tí nú til Danmarkar at spæla eina demofløgu inn, sum teir taka við til London.

Bólkurin hevur verið sera virkin á føroyska tónleikapallinum síðan luttøkan í MTV a cut kom fram, og hann spældi á hópin av tónleikafestivalum í summar. So hetta eru tí tríggir punkarar í toppformi, ið fara á pallin í London.

Leygardagin spældu teir saman við Paradox í Miðlahúsinum í Vágsbotni og hetta kann væl gerast ein tann síðsta konsert í Føroyum áðrenn útlandið veruliga tekur teir til sín, fyrst skal eisini luttøkan í Global Battle of the Bands avgreiðast.

Hoyr tónleik og les meira um The Dreams á www.the-dreams.com




**Í mars 2006 verður telefonbókin borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum. Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt.**

**Hvítu síður**

Mánadagin 7. november 2005 er seinasta freist at koma við rættingum til Hvítu síður í Telefonbókini fyri ár 2006 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 676 í Telefonbókini 2005,og skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 93 01.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari við undirstrikingum, eykaupptøkum og/ella undirupptøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er kr. 2.000,00 (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

**Gulu síður**

Mánadagin 7. november 2005 er seinasta freist at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

**Prísir:**

| | | |
|---|---|---|
| (A) Standardlýsing ................................ | kr. | 700,00 |
| (B) Innramming ........................................ | kr. | 800,00 |
| (E) Grafisk lýsing fyri mm (min. 30 mm) . | kr. | 25,00 |

(sí dømi á s. 674 í Telefonbókini 2005)

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/rættingarblað til Gulu síður er á síðu 675 í telefonbókini 2005, og skal sendast til:
Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn, ella faks 32 11 66.
**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

tel 30 30 30 www.tele.fo www.nummar.fo · info@nummar.fo - www.gulu.fo · info@gulu.fo FØROYA TELE